# Fýra lærlingar til Føroya Tele í Tórshavn

" Summum eydnast alt, tí teirra leið er løgd soleiðis. Flest onnur, sum fáa tingini at eydnast, gera tað, tí tey hava avgjørt, at soleiðis skal tað vera"

- Anatole France



**Søkt verður eftir fýra lærlingum í skrivstovuyrkinum, fyrisiting, í Tórshavn at byrja skjótast gjørligt.**

Føroya Tele er eyðkent fyri sera fjølbroytt arbeiðsøki og harav eisini fjølbroytta starvsfólkasamanseting. Ynskið er, at ein læra á Føroya Tele skal mynda hetta, og tí vilja lærlingar okkara koma út á ymiskar deildir í móður- og dótturfeløgunum. Í lærutíðini er soleiðis ætlanin, at uml. helvtin av tíðini er í Teledeplinum í Niels Finsensgøtu, har tær deildir í FT Samskifti eru, sum hava beinleiðis samskifti við privatkundarnar. Hin helvtin av lærutíðini verður í høvuðssætinum í Klingruni, har millum aðrar hesar deildir eru: Marknaðardeild og Vinnuráðgevar í FT Samskifti, Stjórnardeild og Fíggjardeild í Móðurfelagnum umframt alt FT Net. Lærlingarnir fara í høvuðsheitum at verða knýttir at 4 deildum í eini turnusskipan – tó kann roknast við, at eisini aðrar deildir verða aktuellar í styttri tíðarbilum. Har tað er gjørligt, fara vit at seta lærutíðina saman í samráð lærlingin.

Til røttu fólkini hava vit nøkur sera spennandi lærupláss.

**Til læruplássini ynskja vit fólk við:**

- HF, Student ella HH-prógvi
- førleika at seta seg inn í nýggja tøkni
- evnum at samstarva við nógvar ymiskar samstarvsbólkar
- ídni at røkka ásettum málum

**Lærutíðin er:**

- 2 ár og 18 vikur við Students- ella HF-prógvi
- 2 ár við HH-prógvi

Lønin er sambært sáttmála við millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Starvsmannafelagið galdandi fyri Føroya Tele.

Gjøllari upplýsingar fáast við at venda sær til Starvsfólkadeildina á tlf. 303030.

Umsóknir skulu vera Føroya Tele í hendi í seinasta lagi mánadagin 30. oktober 2006 og skulu sendast til

**Føroya Tele**
Starvsfólkadeildin
Postrúm 27
110 Tórshavn

**Føroya Tele er størsti veitarin av samskiftistænastum í Føroyum. Felagið er skipað sum eitt móðurfelag og trý dótturfeløg. Samlaða starvsfólkatalið er 230, og í 2005 var samlaði umsetningurin kr. 307 mió.**

FØROYA TELE
*Skapið framtíðina saman við okkum!*

# Vit, fólkið í Føroyum...

Stjórnarskipanarnevndin arbeiðir við at smíða nýggja føroyska stjórnarskipan. Grundarlagið undir hesum arbeiði er frágreiðing frá gomlu Grundlógarnevndini og Fyrra flaggdagsálit frá 2004. Í Stjórnarskipanarnevndini eru politikarar og serfrøðingar. Nevndin skal lata landsstýrinum álit og uppskot til stjórnarskipan í seinasta lagi 31. desember í ár.

# Almennur kunningarfundur um nýggja føroyska stjórnarskipan

## í Ósáskúlanum í Klaksvík hóskvøldið 26. oktober kl. 19.30

Stjórnarskipanarnevndin skipar komandi mánaðirnar fyri almennum kunningarfundum kring landið. **Komandi fundur verður í Ósáskúlanum í Klaksvík hóskvøldið 26. oktober kl. 19.30.**

Kunnað verður um arbeiðið at smíða eina nýggja føroyska stjórnarskipan. Greitt verður eisini frá teirri tjóðskaparligu semjuni. Jóhannes Hansen, Kári á Rógvu og Jóan Pauli Joensen luttaka.

Høvi verður at seta spurningar og at ogna sær ókeypis tilfar um stjórnarskipanararbeiðið.

Stjórnarskipanarnevndin
*Faroese Constitutional Committee*

J. C. Svabos gøta 14 · 100 Tórshavn · ssn@ssn.fo · www.ssn.fo

SOZO 522335